STARVSLÝSING

## Tvey eftirlitsfólk til fiska- og djórasjúkudeildina

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

2 størv sum eftirlitsfólk á fiska- og djórasjúkudeildini eru leys at søkja, til setan skjótast gjørligt.

**Bæði størvini fevna um**

- Eftirlit og sýnistøku innan alivinnuna og serliga sambært kunngerð nr. 20 frá 14.03.2005 um koppseting fyri ILA.
- Málsviðgerð í hesum sambandi.
- Luttøku í øðrum eftirlitsarbeiði hjá fiska- og djórasjúkudeildini.
- Annað.

**Faklig krøv**

- Hvørja útbúgving, tú hevur, er sum so ikki tað týdningarmesta, men vit hugsa um útbúgvingar sum laborantur, fiskivinnutøkningur ella tilsvarandi.
- Koyrikort til bil er eitt krav.

**Fyrimunir**

- Royndir innan alivinnuna, við eftirlitsarbeiði sum heild, innaneftirlits-skipanir, sýnistøku o.t.
- Góður kunnleiki til framkomnar telduskipanir.
- Góð samstarvsevni, nærlagni, evni at tosa við fólk, umframt at duga at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst eru eisini fyrimunir.

**Vit kunnu bjóða**

- Fjølbroytt arbeiði, har uppgávurnar eru sera ymiskar, og tú kemur nógv runt í landinum.
- Møguleikar fyri at menna teg í arbeiðinum (skeið, eftirútbúgvingar-møguleikar o.t.).

**Annað**

- Í.s.v. eftirlitsuppgávur skal roknast við, at arbeiðsdagarnir til tíðir kunnu verða sera langir.
- Tú skalt tola broytingar í starvsinnihaldinum í sambandi við víðari menning av fiska- og djórasjúkudeildini.
- Bæði eftirlitsstørvini eru innanfyri karmarnar av játtanini til »Basan av fiskasjúkum«, sum er áramáls avmarkað verkætlan viðvíkjandi koppseting av alifiski og onnur tiltøk fyri at basa sjúkum í alivinnuni.

**Løn v.m.**

Størvini verða sett sambært sáttmálanum millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo.

Umsóknir til bæði størvini við avritum av prógvum, eftirútbúgving, starvs-royndum og møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin hin 1. oktober 2007.

Starvslýsingin kann eisini lesast á www.hfs.fo.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Andrias Petersen, eftirlitsfólk, ella Peter S. Østergård, deildarleiðara og fiskasjúkudjóralækna.

*__Fiska- og djórasjúkudeildin__ er skipað í eina eftirlitseind (F&DSE) og eina kanningar-stovu (F&DSK). __F&DSE__ umsitur djórasjúkulógarverkið, og høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og eftirlit. Higartil hevur arbeiðið fyri tað mesta snúð seg um alivinnuna. Partur av arbeiðsorkuni á deildini fer til verkætlan viðvíkjandi koppseting av alifiski og onnur tiltøk fyri at basa sjúkum í alivinnuni. Hesi tiltøk verða fíggjað av serligari konto, nevnd »Basan av fiskasjúkum«. __F&DSK__ er føroysk tilvísingarkanningarstova fyri fiskasjúkur og tekur sær av sjúkugreining og yvirvøku sambært djórasjúkulóggávuni, serliga av ILA-vaksineraðum alifiski. Arbeitt verður eisini við at menna og íverkseta sjúkugreiningar og sjúkustaðfestingar fyri súgdjór og fugl.*

VASTT 45/0010

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo



Viking Smíð er byggifyritøka, stovnað í 2005. Vit gera bæði nýbyggingar, umbyggingar og umvælingar.

Vit leggja alstóran dent á nøgdar kundar. Okkara málsetningur er at veita dygdargóða og álítandi tænastu til kappingarføran prís.

Byggiverkætlanir, ið vit hava gjørt, kunnu síggjast á heimasíðu okkara *www.viking.fo*

VIKING SMÍÐ
**Bóndaheygur 9**
**FO-100 Tórshavn**

TEAM85

# Mazda Premacy vøruvognur
til sølu

Ein Mazda Premacy turbo diesel frá 2001 til sølu. Bilurin er myrkabláur og er í góðum standi.
Koyrt 163.000 km.
Baksetur fylgja við.

Áhugað kunnu ringja á 222081

